Umhvørvisnevndin í Tórshavnar býráð:

# Eftirlýsir bunkringarreglugerð

**Umhvørvisnevndin á Tórshavnar Býráð, sigur seg saknað eina felags bunkringarreglugerð fyri alt landið. – Tað er alt avgerandi, at vit fáa hana skjótast gjørligt, sigur Tórfinn Smith, formaður í heilsu- og umhvørvisnevndini**

OLJULEKI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Vøkru, hvítu kappróðrarbátarnir hjá Havnar Róðrarfelag, vórðu kanpt so vakrir og hvítir eftir venjingina týskvøldið. Hóast sløkkiliðið hevði verið á stanum og sogið oljulekan, so var framvegis nakað av olju eftir. Nú er bert at vóna, at vágin verður rein á òlavsøku, so allir bátarnir ikki síggja soleiðis út, eftir síðsta róðurin*

*Mynd: Havnar Róðrarfelag*

Tórfinn Smith, formaður í heilsu- og umhvørvisnevndini sigur, at tað er sera óheppið, ikki at hava eina tílíka felags bunkringarreglugerð. – Olja flýtur um kommunumørk, uttan at spyrja nakran eftir. Tí er tað óheppið, at tað ikki er ein felags reglugerð, sum allar kommunurnar kunnu fyrihalda seg til, sigur hann.

Hann sigur, at tað í løtuni verður arbeitt við eini slíkari reglugerð, og at Tórshavnar býráð í næstum fer at rykkja eftir henni. – Tað er alt avgerandi, at vit fáa hana skjótast gjørligt, sigur hann.

Hann heldur afturvendandi trupulleikan um olju á vágni verða sera harmiligan. – Hetta er ótrúliga keðiligt, men óhapp fara jú altíð at henda. Spurningurin er so bara, hvussu nógv av hesum óhappunum kundu verið fyribyrgd, sigur hann. –Vit kunnu jú heldur ikki noktað bátum og skipum at bunkra, sigur hann. Býráðið sendi í mars 2004 nakrar viðmerkingar til innlendismálaráðið, sum hevur reglugerðina um hendi, men enn hava teir einki frætt í málinum. – Við hesi reglugerðini høvdu allar havnir havt eitt sterkt amboð, tá tað kemur til oljulekar.

### Mannagongdir

– Tá ið olja fer á vágna, eigur at verða fráboðað beinanvegin. Hendir tað undir eini bunkring, so verður tað altíð fráboðað, tí oljufeløgini hava greiðar reglur hesum viðvíkjandi. Tá er lætt hjá løgregluni at staðfesta hvør hevur ábyrgdina og skuldina. Tá vita vit eisini, hvagar rokningin fyri upptøkuarbeiðið skal sendast, og um tað kemur so vítt, hvønn vit skulu melda.

Verri er, um tað eru smábátar, sum t.d. leka olju við kølivatninum. Tá verður syndarin ógvuliga sjálvdan funnin, sigur Tórfinn.

Hann sigur, at løgreglan, sløkkiliðið og umboð frá býráðnum altíð fara á staðið, tá slíkar fráboðanir koma. So verður mett um hvussu stórur skaðin er, og hvat skal gerast.

Á býráðnum halda tey tó, at mongu oljulekarnir alt ov sjáldan fáa nakrar avleiðingar. – Høvdu vit havt eina greiða reglugerð sum segði: tað og tað er hent, og tískil fær reiðaríið eina so og so stóra bót, so hevði tað verið nógv greiðari, og tað hevði kanska eisini minkað um lekarnar, tá fólk vistu, at tað heilt víst fekk avleiðingar. Okkurt má í øllum førum gerast, tí vit finna okkum ikki í hesum longur, verður sagt á býráðnum.

## Oljuleki á Havnarvág

OLJULEKI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Týsdagin kl 15.58 fekk løgreglan í Havn eina fráboðan um ein oljuleka á Havnarvág, táið eitt skip skuldi bunkra.

Tað, sum hendi var, at skipið hevði bílagt 30.000 litrar av olju, men táið 27.000 litrar vóru pumpaðir, fleyt brádliga yvir. Maskinmeistarin skifti yvir í ein annan tanga, men har gingu bert 500 litrar í, so fleyt eisini yvir har.

Tann, ið hevði bunkringina undir hond, stongdi oljukranan alt fyri eitt. Men tá var longu fitt av olju farið út á Vágna.

Ikki er greitt hvør hevði skuldina, men løgreglan í Havn kannar nú málið.

Oljulekarnir á vágni:

# Stór líkasæla

**Týsdagin um 16 tíðina fekk Tórshavnar sløkkilið boð um olju á vágni. Hetta er 12. fráboðanin í ár, og á brandstøðini halda teir, at hetta høga talið botnar í líkasælu frá teimum, ið hava oljuna um hendi**

OLJULEKI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Tað var ikki ein so serliga stórur leki, men eini 200-300 litrar fóru á sjógv, siga teir á Brandstøðini. Teir siga, at slík óhapp henda, táið skip ikki fáa tikið ímóti tí nøgdini av olju, sum teir biðja um. Tað flýtur rætt og slætt yvir.

Teir fóru beinanvegin 6 mans av brandstøðini, og løgdu eina flótisperru um skipið, sum bunkraði. Men teir fingu ikki alla oljuna uppaftur, verður sagt.

Oljan rekur skjótt á sjónum og tað er skjótt, at hon spreiðir seg um stór øki. – Vit fingu nógv av tí sum var farið á sjógv, men vit fáa ongantíð tikið alt upp aftur. Vit kunnu ikki súgva oljuna upp mitt á vágni, men mugu hava hana inn ímóti onkustaðni, fyri at fáa alt upp. Men tað er sjáldan at tað letur seg gera. Ofta rekur oljan inn ímillum bátabrúgvarnar í Vágsbotni, og har verður torført at fáa alt uppaftur, verður sagt á Brandstøðini.

Teir siga, at teir í ár hava fingið heili 12 fráboðanir um olju á vágni. Í juni vóru 3, og í juli hava higartil verið 2.

Tað er eitt stórt arbeiði at fáa olju uppaftur av vágni, og týsdagin vóru teir 6 sløkkiliðsmenn til arbeiðis, umframt ein frá brennistøðini, sum hevði súgvaran um hendi.

Vit meta, at tað er alt ov nógv líkasæla, tá tað kemur til olju. Fólk leggja einki í, um tað fara nakrir litrar á sjógv. Men tað ger stóran skaða, og tað er ógvuliga óheppið fyri seglskipini, sum liggja inni í Vágsbotni við turistum, staðfesta teir av Brandstøðini.

# Gåte komin til landið

**Norski bólkurin, Gåte, ið skal framføra á G!, er komin til landið**

TÍÐINDASKRIV
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Ein av bólkunum, ið skal framføra á G! fríggjakvøldið, er komin til landið. Mikukvøldið vóru tey niðri á sandinum í Syðrugøtu og hugdu seg um.

Gåte er ein hin best umtókti bólkurin í Noregi. Tey flætta gamlan norðurlendskan fólkatónleik við nýggju rákini frá nútíðini.

Tey hava verið á konsertferð í Evropa, har tey eisini hava luttikið á teimum stóru festivalunum. Nevnast kann millum annað, at tey vóru við á Roskilde festivalinum í fjør.

Gåte framførir á G! fríggjakvøldið kl. 21.15.



*Norski bólkurin Gåte er komin til Føroya. Mikukvøldið vóru tey á sandinum og hugdu seg um*



# Kriminelt flogvit

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur enn einaferð givið út nýggja bók. Tað er Bergur Rasmussen, sum hevur týtt Eoin Colfer og hansara Artemis Fowl úr enskum. Talan er um æventýrkenda ungdómsbók, sum er tann fyrsta í røðini av trimum. Kring heimin eru bøkurnar um Artemis Fowl sera væl umtóktar.

### Flogvit

Á baksíðuni á nýggju bókini lesa vit: „Tólv ára gamli Artemis Fowl er eitt kriminelt flogvit. Men hóast tað kann Artemis ikki vita, hvussu endin verður, tá ið hann skipar fyri at ræna úlvin, Holly Short, sum er kapteynur í HULdeildini. Tí hetta eru ikki álvar úr barnasøgum! Nei, hesir álvarnir eru vandamiklir og alvápnaðir…"

### Álvar broyta mannagongd

"Artemis heldur, at hann hevur sett álvarnar skák mát, tí teir eru bundnir av føstum reglum og mannagongdum. Men so broyta álvarnir sínar mannagongdir…"

Eoin Colfer er føddur í 1965 og íri. Hann er útbúgvin fólkaskúlalærari. Hansara fyrsta bók varð givin út í 1998, men tað var ikki fyrrenn í 2001, tá hann gav Artemis Fowl úr, at hann gjørdist rættiliga kendur uttanfyri landoddarnar eisini.

**-hkm**




*Tólv ára gamli Artemis Fowl er eitt kriminelt flogvit...*

# Nýtt frá Yrkisdeplinum

Ársfrágreiðingin hjá Yrkisútbúgvingarráðnum er nú latin almenninginum. Frágreiðingin er fyri ráðsetuna 2003/2004. Hon er ritstjórnað av Yrkisdeplinum og ráðsformanninum í Yrkisútbúgvingarráðnum, Alfred Petersen, sum er valdur av landsstýrismanninum. Kunnað verður um virksemið hjá ráðnum, yrkisnevndunum og Yrkisdeplinum. Harumframt er yvirlit yvir ráðslimir, varalimir og skúlaumboð. Viðheftur frágreiðingini er bóklingur um yrkisútbúgvingarnar. Læraratilgongdin 2003 er eisini lýst. Lesið meir um Yrkisdepilin á heimasíðuni www.yrkisdepilin.fo.

**-hkm**

# Skil á kervið

Áðrenn tann 1. september 2004 skulu øll upplýsingarkerv, sum eru fevnd av lógini um persónsupplýsingar, lúka treytirnar í kunngerð nr. 28, frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

Kunning um hesa lóg fæst á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum www.datueftirlit.fo. Har finnur tú trygdarkunngerðina og vegleiðing til kunngerðina.

**-hkm**

# Innlit í jørðina




Jarðfrøðissavnið hevur fyri fyrstu ferð givið út prentaða ársfrágreiðing. Endamálið er at geva fólki innlit í tað arbeiðið, sum Jarðfrøðissavnið hevur um hendi við kolvetnisleiting, jarðalisfrøði og almennari jarðfrøði.

Í ársfrágreiðingini finnur tú eisini smærri greinar um ymiskt evni, sum knýta seg at stovninum og arbeiðið, sum stovnurin ger. Til ber at lesa um "Oljuleiting við Føroyar" eftir Sigurð í Jákupsstovu, "Jarðfrøðiligar forkanningar í samband við tunnilsgerðir" eftir Claus Andersen og "Elsta jarðfrøðiliga granskingin og kortleggingin av Føroyum" eftir Anette Jægerup.

Ársfrágreiðingin telir 34 síður, og hon er prentað í litum. Meira nágreiniligir upplýsingar finnur tú á heimasíðuni hjá Jarðfrøðissavninum www.jfs.fo.

**-hkm**

# Ólavsøka í SMS

TÍÐINDASKRIV
*SMS*

Leygardagin kl. 11.00 verður árliga ólavsøkuframsýningin í SMS sett. Klokkan 11.30 syngur amerikanski gospelsangarin Russ Taff. Tann stóra ólavsøkuframsýningin í SMS verður í ár gjørd saman við Fornminnissavninum. Framsýningin verður sett leygardagin 17. juli kl. 11.00 av Eyðuni Andreasen, fólkalívsfrøðingi.

### Fleiri brúðarpør

Framsýningin umfatar eina rúgvu av myndum av brúðarpørum, umframt brúðarklæðir gjøgnum tíðirnar. Fornminnissavnið eigur bæði myndirnar og klæðini. Tilsamans er talan um umleið 200 myndir, har Fornminnissavnið kennir nøvnini á fólkunum á teimum 60. Fleiri myndatakarar hava tikið myndirnar kring alt landið, og Fornminnissavnið vónar, at fólk fara at hjálpa við at finna útav, hvørji fólkini eru á myndunum. Talan er ikki bara um brúðarpør, onkuntíð eru onnur á myndunum eisini, eitt nú systkin.

### Føroysk framleiðsla

Á framsýningini verða eisini nøkur dømi um brúðarstás, t.d. tríggir brúðarkjólar frá ávíkavist 1915, seinast í tjúgunum og seinast í 40'árunum, umframt tveir klædningar, annar frá umleið 1900 og hin frá seinast í 40'árunum.

Viðvíkjandi gomlu klæðunum er at viðmerkja, at talan er um føroyska framleiðslu, og at øll klæðini verða útstillað í glasmontrum.

### Russ Taff á setanini

Í sambandi við setanina leygardagin hevur SMS gjørt avtalu við fyrireikararnar av G! Festival, sum er í Gøtu fríggjadagin og leygardagin, at kendi amerikanski gospelsangarin, Russ Taff - sum framførir á G! leygardagin kl. 19.00 - eisini trínir á pallin á Torginum í SMS. -Russ Taff hevur roynt seg innan eina ørgrynnu av genrum, og hevur sum fáur megnað at samantvinna samtíðartónleik við bæði tónleikaligu, mentanarligu og andaligu røtur sínar djúpt í suðurstatunum í USA. Eitt orð, ið væl kann lýsa stílin hjá rock'n'rollaranum, soul manninum, country og gospel sangaranum Russ Taff, er 'Sál'. Framførslan hjá Russ Taff á Torginum í SMS verður leygardagin kl. 11.30.